## Løkir nýggja heimasíðu

Framtaksfelagið P/F Løkir, sum P/F Tjaldur, P/F Krúnborg og P/F Føroya Banki stovnaðu í 2006, hevur fingið nýggja heimasíðu. Seinasta stóra íløgan hjá felagnum var íløgan í Statoil Føroyar, sum Løkir gjørdi saman við fleiri øðrum føroyskum vinnufyritøkum. Løkir gjørdi eisini í januar í ár íløgu í Farodane, sum síðan er lagt saman við Com-Data og Reproz í samtakið NEMA. Nevndarformaður í Løkir er Petur Háberg Jacobsen. Hinir nevndarlimirnir eru Bergur Poulsen og Líggjas í Bø, sum eisini er stjóri.



## Ølklubbin Kaggin fingið mønustingin

Ølklubbin Kaggin í Havn verður nú lýstur til sølu. Seinastu mánaðirnar hevur ølklubbin Kaggin í Havn verið afturlatin. Nú hevur gamli ølklubbin, sum varð stovnaður í 1969, eftir øllum at døma fingið mønustingin, tí í bløðunum í morgion verður bygningurin hjá Kagganum á Svínaryggi í Havn lýstur til sølu. Bygningurin er 454 fermetrar til støddar í trimum hæddum. Húsið, sum nú stendur har, varð bygt í 1989, eftir at eldur kom í gamla Kagg-an. Kortini er niðasta hæddin munandi útbygd í 1998. Bygningurin, sum er bygdur til veitslu- og náttklubb avirksemi, kann hýsa 275 fólkum og hevur góðkendan ídnaðarkøk

# Virðisvøksturin hevur

**- Tað er ikki rætt, at okkara fiskavirkisvinna ikki hevur havt virðisvøkstur í framleiðsluni. Vit hava havt ein virðisvøkstur í upsaframleiðsluni, sum helst er ein hin størsti í heiminum. Vøksturin hevur verið líka stórur, sum upsin er verdur. Men vøksturin, sum verið hevur, klárar ikki at "matcha" vøksturin í kostnaðinum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

*Meinhard Jacobsen ásannar, at seinastu árini hava verið trupul, og nógvar orsøkir eru til tað. - Føroya Fiskavirking og Fiskasølan vórðu løgd saman, og seinnu vórðu bæði feløgini seld undir einum. Vit hava brúkt nógva orku upp á at strukturera okkum, og vit hava eisini keypt fleiri skip, sigur stjórin í Faroe Seafood*



Stjórin í Faroe Seafood er als ikki samdur við teimum, sum halda upp á, at føroyska fiskavirkisvinnan ikki hevur havt virðisvøkstur í framleiðsluni seinastu árini.

Tað var á framløgufundi hjá grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe í síðstu viku, at orð fullu um, at føroyska fiskavirkisvinnan ikki hevur megnað at skapt nakrar virðisvøkstur í síni framleiðsluni seinastu árini.

### Púrasta skeivt

- Virðisvøkstur er tað meirvirði, tú skapar, tá ið tú virkar eitt kilo av ráfiski, og tað er als ikki rætt at siga, at eingin vøksturin hevur verið her. Tað er púrasta skeivt.

Tað sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Faroe Seafood.

- Eg trúgvi, at tann virðisvøkstur, sum vit hava havt í upsaframleiðsluni – tað, sum hvørt kilo er vorðið meira vert í framleiðsluni – nærkast tí mesta, sum nakar í heiminum yvirhøvur hevur at vísa á. Vøksturin hevur verið á leið tað sama, ið upsin sum ráfiskur verður keyptur fyri.

Hann leggur soleiðis dent á, at virðisvøksturin í framleiðsluni av eitt nú upsa ongantíð hevur verið størri enn nú.

### Kostnaður veksur

- Men eitt er sjálvur virðisvøksturin. Annað er teir útreiðslupostar, sum eru knýttir at okkara viirksemi. Her siggja vit, at virðisvøksturin als ikki megnar at "matcha" vøksturin í kostnaðinum, sum er vaksin uppaftur skjótari.

Stjórin í Faroe Seafood vísir á, at størsti posturin á útreiðslusíðuni er lønir, og síðan kemur alt tað, tú keypir og tær tænastur, tú noyðist at hava í slíkum virksemi.

- Tað er hesir kostnaðir, sum eru so nógv øktir og eru øktir lutfalsliga skjótari enn sjálv virðisøkingin, leggur hann aftrat.

### Smáir marginalar

Stjórin í Faroe Seafood ásannar, at tað hevur verið torført hjá føroysku fiskavirkisvinnuni at tjent pening seinastu árini, tí marginalarnir eru so ógvuliga smáir, sum hann tekur til. Kostnaðirnir eru nógv øktir, og ráfiskurin hevur verið lutfalsliga dýrur. At dollarin hevur verið so lágur, hevur eisini havt negativa ávirkan á gongdina.

Tað er so nógv, sum ávirkar gongdina í fiskavirkisvinnuni.

- Bara eitt 10 oyra upp á hvørt kilo av ráfiski, kostar okkum einar 4 miljónir krónur um árið. Smáar broytingar kunnu soleiðis hava stóra effekt, sigur hann.

### Nøkur trupul ár

Meinhard Jacobsen ásannar, at seinastu árini hava verið trupul, og nógvar orsøkir eru til tað.

- Føroya Fiskavirking og